
8-kantað stjørna




Tilfar: Litað pappír, silkipappír ella annað tunt pappír og lím.

Støddfrøðiligt endamál:
At næmingarnir fáa royndir í at viðgera areal, skap, symmetri, vinklar og at snara skap.

Mannagongd:

1. Boygg eitt litað A4-pappír í tvey og klipp sundur. So hevur tú 2 A5-ørk. Boygg annað í tvey, so hevur tú tvey A6-ørk. Boygg so aftur annað av hesum í tvey, so hevur tú 2 A7-ørk.
2. Boygg nú eitt ark av hvørjari av hesum støddum sum víst á myndini niðanfyri.
   - Boygg arkið eftir longdini í tvey, boygg uppaftur (a). So hevur tú symmetriásina.
   - Boygg so øll hornini inn móti symmetriásini (b).
   - Boygg tvey horn inn móti miðjuni (c) sum tá ið tú boyggir pappísflogfør.
   - Nú er eitt av átta hornum í stjørnuni liðugt.



a b c d

3. Samanber stjørnuhornini, sum tú kanst gera úr teimum ymsu ørkunum. Vel ta støddina, sum tú vilt hava. Ger so 7 stjørnuhorn afturat í hesi støddini.

4. Líma tey átta stjørnuhornini saman við límí sum víst í (d).

Spurningar til næmingarnar:

1. Samanber tey ymsu ørkini frá A4 til A7. Dugir tú at lýsa skapið á ørkunum. Er ein eginleiki, sum gongur aftur í øllum skapunum?
2. Hvussu nógv A6-ørk kunnu vit fáa úr einum A4-arki?
3. Hvussu stórur partur er eitt A7-ark av einum A4-arki?
4. Hvat geometriskt skap hevur eitt liðugtboygt stjørnuhorn?
5. Tekna eina tekning av lidnu stjørnuni. Tekna so ein sirkul mitt í stjørnuni. Hvussu nógvar partar býta stjørnuhornini sirkulin í?
6. Hvussu nógv stig eru allan vegin runt um stjørnuna?
7. Hvussu nógv stig eru millum hornið, sum peikar beint uppeftir og hornið, sum peikar beint niðureftir?
8. Hvussu nógv stig eru millum tvey grannahorn?
9. Hvussu kanst tú vita svarið í 8 uttan á máta?